




# Sambands flokkurin forðingin fyri framburði



Val X

**KRISTOFFUR GAARDLYKKE**
Javnaðarflokkurin

Tað er eitt málsøki sum er vanrøkt og er tað fiskivinnumál har er einki hent. Spekulatiónin skuldi steðgast. Tað er neyvan nakrantíð so nógvur kapitalur sogin úr fiskivinnuni fyrr og hvat er gjørt einki sambands bóndin læt standa til og mundi lati fólksins ogn fara í allar ævir.

Men vit fingu tað broytt til at loyvini ganga út í 2018 og tá kunnu blíva fólksins ogn.

Samtíðis blokerar fiskimálaráðið teimum sum hava fingið loyvi at fiska til 2018. at skifta skipini út eg veit konkret dømi har eigarar av skipi hava tilsøgn um at teir kunnu skifta motorin út til størri motor. Hava so søkt um at skifta skipi við eitt minni skip við størri motori men av eini ella aðrari merkiligari grund so letur tað seg ikki geara ótrúligt men satt.

Skifta viðkomandi menn motor fyrst fyri 15 til 20mill.Kr fyrst fyri síðan at skrottað skipi ja so góðtekur fiskimálaráðið tað og teir kunnu tá skifta skipi út.

Við í javnaðar flokkinum taka fult undur við stovnsrøkt men ikki vina og kenninga politikki Sambandsfloksins

**X við C**

# Leggja pening til síðis í góðum tíðum



Val X

**HØGNI MIKKELSEN**
Valevni Sambandsfloksins

Alla mína tíð hava politikkarar tosað um at leggja pening til síðis, tí sum vit øll vita eru tað ikki bara góðar tíðir.

Við tað at nógvar skattakrónur v. m. koma í landskassan, so er hetta ein upplagdur møguleiki til at gjøgnumføra hetta, tí tað er ov seint tá kassin er tómur. Lat okkum gera tey arbeiði sum er neyðugt, og ikki brúka hvørja krónu sum er í landskassanum.

Í privatu vinnuni veit mann hvussu skiftandi virksemi kann vera.Tá tað privata virksemi minkar, er neyðugt at at hitt almenna setir arbeiðir í gongd, so støðugt virksemi er alla tíðina. Tað er tað sum okkara politikkarir hava tosa um, men sum vit øll vita er tað tíðan verri ikki gjørt.

Tí er tað skeivt, at tað almenna setir eina rúgvu av arbeiði í gongd nú, samstundis sum tað privata hevur meir enn ríkiligt at gera-lat okkum bíða við hesum almennum íløgunum til tíðin er búgvin til tað!

Í 90unum vóru vit nógv sum fóru av landinum at arbeiða, tí onki arbeiði var her, og onki var í kistubotninum í landskassanum, tað má ikki endurtakast aftur.

Við einum góðum figgjarpolitikki er møguleiki fyri at 90árini ikki endurtaka seg aftur.

# Hví ikki ókeypis kring alt landið?



Val X

**HEÐIN MORTENSEN**
valevni Javnaðarfloksins
www.hedinmortensen.com

Í eitt ár hevur Tórshavnar kommuna havt eitt royndarár við ókeypis busskoyring, og tað er eydnast so sera væl, at hildið verður fram hetta árið við. Okkara royndir vísa, at ókeypis busskoyringin er sera væl móttikin, so fleiri og fleiri brúka bussin, heldur enn bilin.

So mikið væl hevur hilnast, at áhugi er fyri hesi royndini uttanlands við, og í Norra eru ætlanir um at fara undir ókeypis busskoyring við Tórshavnar kommunu sum fyrimynd. Hetta vísir, at vit í Føroyum saktans kunnu ganga undan og vera fyrimynd fyri onnur, tá ræður um umhvørvisvernd.

Nú haldi eg tó, at tíðin er komin, at vit fara eitt stig víðari. Hví ikki gera busskoyringina kring alt landið ókeypis? Tá tað ber væl til í Tórshavnar kommunu, skuldi einki verið til hindurs fyri, at tað sama varð roynt við Bygdaleiðum kring alt Føroya land.

Royndir okkara hava víst, at alt stríðið og allur kostnaðurin av umsiting, skipanum, ferðaseðlum og øllum, sum hoyrir til, hvílir næstan í sær sjálvum við ókeypis koyringini. Harafturat kemur so, at bussarnir verða brúktir, heldur enn bilarnir, so tí verður slitið á vegunum minni, umframt at eitt nú verður óneyðugt við píkakoyring.

Havnin hevur sum fyrsti høvuðsstaður í heiminum tikið hetta stigið og havt góðar royndir av tí. Tí er tíðin komin, at Føroyar sum fyrsta land fara undir ókeypis busskoyring. Í eini tíð, har Føroyar fáa ákoyringar fyri drál á umhvørvisøkinum, er hetta eitt upplagt høvi at ganga undan og fremja góðan umhvørvispolitikk í verki!

Vit hava møguleikan at fáa heimsins bestu kollektivu ferðslu, og kunnu á hesum øki í heimshøpi vísa okkum sum eitt framkomið fólk, ið torir at skera ígjøgnum og gera nakað við tað, ið veruliga kann muna á umhvørvisøkinum. **Hesum vil eg virka fyri!**

# Høvuðsvinnan í Føroyum á einum vegamóti!



Val X

**NIKLÁI PETERSEN**
Tjóðveldi

Tað stendur á hjá flakavinnuni at fáa nokk av arbeiðsfólki, og hjá fleiri skipabólkum er støðan tann sama.

Nótaskipini og flakatrolararnir hava tíbetur ikki henda trupuleika at dragast við.

Vinnan er í stórari kapping við seg sjálva, og arbeiðsmegin fer hagar, hon fær mest burturúr, tað sigur seg sjálvt.

At okkara høvuðsvinna er komin í trupulleikar av væntandi arbeiðsmegi, er í sær sjálvum ein stórur samfelagstrupuleiki.

Alivinnan er tíbetur komin á beint aftur og er í vøkstri, og hon fer at krevja meiri arbeiðsmegið, sum tíðin líður.

Væntandi arbeiðsmegið í landinum í løtuni viðførir nógv dýrari loysnir fyri brúkaran av hesi somu orsøk, so tann trupulleikin má loysast sum skjótast.

Nú valstríðið er byrjað, er nógv frammi um berghol, flogvøllir, skúlar o.s.v., o.s.v. Alt gott um tað, men mann er noyddur at loysa trupuleikarnar frá rótini av, annars spyrst onki gott burturúr.

Samfelagið hjá okkum er sera viðbrekið, tá hóttafall er, og tí er alneyðugt at hava okkurt í sjáttuni, áðrenn tær truplu støðurnar uppstanda. Hetta haldi eg manglar í stóran mun í tí politiska kjakinum. Vit vita altíð aftaná, hvussu vit skuldu havt gjørt.

Ein góður telvari hugsar altíð nakara leikir fram.

# Vánaligt úrslit í PISA



Val X

**TÓRI HØJGAARD**
Form, Ung fyri Miðflokkin
Valevni Miðflokksins

Herfyri var kunngjørt at Føroyar enn einaferð høvdu fingið eitt sera vánaligt úrslit í PISA kanningini – og hesuferð var tað ikki bara ein undankanning.

Tann nú so ófrættakenda PISA kanningin hevut elvt til mikið kjak her á landi, og fólk eru sera ymisk á málið, um hvussu vit skulu betra um førleikarnar hjá næmingunum í føroysku skúlunum.

**Læraraútbúgvingin**

Sum flest øllum kunnugt er, og hevur tað síðani 1870, verið gjørligt at lesa til lærara í Føroyum. Læraraútbúgvingin í Føroyum er at javnmeta við tí í Danmark.

Eg meti at hugskotið at broyta verandi skipan, so at læraraútbúgvingin verður meira lík einari Bachelor útbúgving, har lesandi leggja meira dent á eitt ávíst fak, t.d enskt, føroyskt ella støddfrøði. Umframt hetta, hevði so sjálvandi komið tann meira pedagogiski parturin av lesnaðinum. Hetta hevði givið tí læraralesandi møguleika fyri, at ogna sær nógv størri førleikar í tí einstaka fakinum, og hevði tískil ført til, at viðkomandi, sum lærari, betur var førur fyri at undirvísa í hesum sama faki. Hetta mynstrið síggja vit í m.a Finnlandi, ið varð tað landið ið kláraði best í PISA kanningini.

**Undirvísingin**

Í dagsins fólkaskúla, verður fyri ein stóran part undirvíst heilum flokkum, har allir næmingar, óannsæð bókligan førleika, fáa somu undirvísing. Um man hugsar um hetta eina lítla løtu, so sigur tað seg sjálvt at tað er púra ógjørligt hjá einum lærara, at undirvísa uml. 20 næmingum á ymiskum støði, í senn. Lærarin er heilt einfalt ikki førur fyri at geva eina frálæru, har allir næmingar kunnu fylgja við. Hetta má sjálvandi enda við, at sum oftast verður undirvísingin tillaga miðal næminginum, í meðan baði tann næmingurin ið er yvir miðal, og tann ið er undir miðal í bókligum førleika, detta burtur í millum.

Tí kundi tað verið eitt hugskot, at býtt næmingarnar upp, eftir hvussu væl fyri teir vóru. Hetta hevði gjørt at teir, ið vóru oman fyri miðal, fingu tað eyka avbjóðingina, ið teimun tørvaði, samstundis sum teir ið høvdu torført við tí bókliga, fingu undirvísingina á tí støði ið teir vóru á. Havi tosa við fleiri lærarar ið eftirlýsa einari tílíkari loysn, við tað at verandi støða als ikki er nøktandi.

**PISA og framtíðin hjá Fólkaskúlanum**

Tó at summi hava hug at kveistra hesa kanning til viks, sum verandi ósakliga og óvíðkomandi, so haldi eg at vit áttu, um ikki annað, at sæð hesa kanning sum eitt høvið til eitt sindur av sjálvsrannsakan. Hvat vilja vit við fólkaskúlanum? Og vilja vit gjalda tað, ið tað kostar at hava ein góðan skúla? Kanska tað hevði verið eitt hugskot at brúkt nakrar av teimun mongu tunnilsmilliónunum uppá skúlan í staðin?